

HEIMLIGT

*– Sonurin, Arnbjørn sum eitur eftir abbanum í Havn (við eftirnavninum R. Thomsen), varð føddur ov tíðliga, men vit hava tað sera gott saman her á Skarvanesi, sigur Anna Olsen, sum síðani 2007 hevur búð í lítlu bygdini á vestursíðuni á Sandoynni*

# Skarvanes – har einsemi ikki finst

**BYGDARLÍV – Veitst tú hvat, – tú spyrt faktiskt akkurát sama spurning sum so mong onnur hava spurt: "Er tað ikki øgiliga einsligt at búgva á Skarvanesi?" Men nei, tað er tað ikki, tí einsemi er ein mentalur tilstandur, og er ikki treytað av, hvussu nógv fólk tú hevur rundan um teg, slær Anna Olsen fast. Lív er aftur í bygdini, og pálmasunnudag hendir tað sjáldsama, at ein unglingi verður fermdur og eitt barn av Skarvanesi verður doypt undir einu og somu gudstænastu.**

Snorri Brend

**Skarvanes:** Tann sum koyrir oman í bygdina og ikki steðgar á, kann skjótt staðfesta, at her á Skarvanesi kann ikki vera nakað lív:

Her kann av sonnum einki menniskja búgva og enn minni trívast. Her er so myrkt, fjarskotið og so langt frá umheiminum, at hetta neyvan er eitt stað, har ein vil búseta seg for good. Soleiðis hugsar helst tann ókunnugi.

Men Anna Olsen, ið er bachelor bæði í søgu og stjórnmálafrøði, hevur tó valt at ganga ímóti streyminum. Og tað hevur hon eisini alla orsøk til:

Hiðani er omma hennara ættað. Her leikti hon mangan sum barn. Hetta er hvørki eitt ov friðarligt, fremmant ella fjarskotið stað fyri hana. Samstundis er Skarvanes tiltikið gott kornpláss, og man hava besta sólargangin í landinum.

Men einsligt, – tað er tað í øllum førum ikki:

– Tað kemur sjálvandi ann uppá, hvat ein leggur í tað at vera einsligur. Sjálvandi er tað einsligt at búgva her, um man liggur innikavaður í tríggjar dagar og ikki sær eitt einasta menniskja.

– Men spyrt tú meg, um eg føli meg einsamalla her í hesi lítlu bygdini, so er svarið avgjørt nei. Her á Skarvanesi hava vit bæði huldufólk og Jesu-pápan, sigur Anna Olsen við einum brosi.

Í tí nærum 400 ára gamla barnaheiminum hjá ommu hennara, liggur hon í dag grundarlag undir eitt heim, har trý hjørtu sláa í løtuni - hon sjálv og tveir synir hennara, Hans Kristjan 14 ára gamal og Arnbjørn sum skjótt verður tveir mánaðir. Í mars verður familjan savnað aftur.

– Vit leigaðu eina tíð í Havn, men tá maðurin - Sjúrður Arnbjarnarson - fór niður at lesa til fangavørð, avgjørdu vit at flyta suður higar. Her hava vit ráð til at liva og til at lesa, hóast vit bert hava eina inntøku.